# So er at bridge'a

**Fríggjadagin verður farið undir liðkappingina, og tað er samstundis startskotið til ein spennandi bridge-kalendara fyri várið 2006**

BRIDGE
*Bogi Simonsen*

Liðkappingin hjá Føroya Bridge Samband byrjar fríggjadagin 13. januar 2006 í skúlanum í Sørvági.

Freistin at boða frá luttøku til liðkappingina er fríggjadagin 6. januar 2006. Tilmelding hjá Jóannes Mouritsen 311930 ella Robert Langaard 742002.

Kappingin í ár sær rættiliga spennandi og opin út. Liðið hjá Allani Dal- Christiansen, ið vann 1.deild í fjørð, er aftur í ár favorittur at vinna, meðan liðið hjá Boga Simonsen og Símin Lassaberg væntandi fara at geva teimum harða kapping.

Í fjørð vóru bæði ein 2. deild og 3. deild við í kappingini. Í ár verða tær nokk lagdar saman til eina størri deild. Fleir sera sterk lið fara at dystast um at vinna sær sæti í bestu deildini.



*Ein av veteranunum í føroyskum bridge, Oddmar Danielsen, hyggur her at fordeilingunum*

## Steypakappingin

Fyri tveimum árum síðani avgjørdi FBS, at broyta steypakappingina, soleiðis, at hon varð spæld sum ein miniliðkapping. Hendan broyting gekk ikki serliga væl, tískil verður kappingin broytt aftur til tann gamla háttin við cup-skipan. Eftir hesari skipan, verður lutakast millum øll tey tilmeldaðu liðini. Tað liðið, sum fyrst verður trekt hevur heimadyst og skal syrgja fyri at hesin verður spældur eftir galdandi reglum og innan ásettu tíðarfreist. Tá ið komi er fram til hálvfinaluna og sjálva finaluna, verður tað FBS, ið skipar fyri dystinum.

Vinnarin av steypakappingini sleppur at umboða Føroyar í tí sera sterku Rottneros kappingini, ið verður spæld einaferð í mai 2006. Liðini, ið luttaka í hesari kapping eru steypavinnarar úr hinum norðanlondunum.

Freistin at boða frá luttøku til steypakappingina er 13. januar 2006.

Tilmelding hjá Jóannes Mouritsen 311930 ella Robert Langaard 742002.

## Spæl

Hvat hevði tú melda sum sunnan við hesari hondini. Pass kemur til tín í 3.hond.

N/NS
Sp D109865
Hj 4
Rú K8765
Kl E

Ein kann velja millum 1sp, 2sp og pass. Sjálvur vildi eg melda 2sp fyri at sperra mótpartin. Sigið tykkara meining á bridge.fo.

**Bridge Kalendarin 2006**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Januar | Fríggjadag, 13 | 19:00 | FM-Lið Sørvágur |
| | Leygardag, 14. | 10:00 | FM-Lið Sørvágur |
| | Sunnudag, 15. | 14:00 | Grand Prix par Sørvágur |
| Februar | Fríggjadag, 3. | 19:00 | FM-Lið Eysturoy |
| | Leygardag, 4. | 10:00 | FM-Lið Eysturoy |
| | Sunnudag, 5. | 14:00 | Grand Prix par Eysturoy |
| | Fríggjadag, 24. | 19:00 | FM-Lið Tórshavn |
| | Leygardag, 25. | 10:00 | FM-Lið Tórshavn |
| | Sunnudag, 26. | 14:00 | Grand Prix par Tórshavn |
| Mars | Fríggjadag, 17. | 19:00 | FM-Lið Klaksvík |
| | Leygardag, 18. | 10:00 | FM-Lið Klaksvík |
| | Leygardag, 18. | 20:00 | Veitsla við steypahandan |
| | Sunnudag, 19. | 14:00 | Grand Prix par Klaksvík |
| Apríl | Leygardag, 1. | 10:00 | FM-Par Semi-finala, Tórshavn |
| | Leygardag, 22. | 10:00 | FM-Par finala Tórshavn |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN**
MENN

| | d | v - j - t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 H71 | 0 | 0 - 0 - 0 | 289 | 235 | 54 | 8 |
| 2 Kyndil | 0 | 0 - 0 - 0 | 268 | 235 | 33 | 8 |
| 3 VÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 277 | 273 | 4 | 6 |
| 4 StÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 251 | 257 | -6 | 6 |
| 5 KÍF | 0 | 0 - 0 - 0 | 249 | 281 | -32 | 2 |
| 6 Neistin | 0 | 0 - 0 - 0 | 265 | 318 | -53 | 1 |


Val av limum til UMBOÐSRÁÐIÐ fyri OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA

• **Í februar mánaði ár 2006 skulu 12 limir veljast til Umboðsráðið fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna. Valið er galdandi í fýra ár.**

Limir, ið ynskja at verða uppstillaðir til val sum umboðsfólk, skulu boða frá hesum skrivliga til høvuðsskrivstovuna innan 1. februar 2006.

Fráboðanin skal vera undirskrivað av í minsta lagi 25 stillarum, sum eru limir í felagnum. Ein limur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og tað kann bert vera eitt valevni á hvørjum lista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk í felagnum og teirra hjúnarfelagar ella sambúgvar kunnu ikki veljast sum umboðsfólk.

Eingin kann virka sum umboðsfólk, um tey eru sett í starv í ella arbeiða fyri virki, sum er kappingarneyti hjá felagnum og tess dótturfeløgum.

• **Allir tryggingartakarar í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F eru limir í felagnum.**

Ognarfelag Tryggingartakaranna er eitt felag við avmarkaðari ábyrgd, hvørs endamál millum annað er, beinleiðis ella gjøgnum annað felag, at eiga partapening í Tryggingarfelagnum Føroyum P/F og øðrum feløgum og annað íløguvirksemi.

Limirnir velja umboðsfólk at umboða atkvøðurætt limanna á aðalfundi.

Í Umboðsráðnum eru 23 fólk vald av og millum limirnar í felagnum. Val er annaðhvørt ár (líka árstal) og er galdandi í fýra ár, soleiðis at ávikavíst 11 og 12 av limunum fara frá á hvørjum vali.

Viðtøkurnar fyri felagið lýsa nærri, hvussu val fer fram og virki felagsins annars. Viðtøkurnar eru at fáa á høvuðsskrivstovuni.

Tórshavn, 3. januar 2006
**Ognarfelag Tryggingartakaranna**
**Stjórnin**

OGNARFELAG TRYGGINGARTAKARANNA
Kongabrúgvin · Postboks 329 · FO-110 Tórshavn
Tel 345600 · Fax 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo

www.sansir.fo